gult cyan magenta svart

JØRGEN-FRANTZ 100 ÁR. »Heldur fátækur alt lívi›, men føroyingur, enn altráan at vinna sær óføroyskan frama« Jørgen-Frantz Jacobsen

William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen avmynda›ir í 1919

Fáfongd og fei g›

Jógvan Isaksen

Í minningarrø›u í Keypmannahavn, á›renn kistan vi› Jørgen-Frantz Jacobsen var› send heim, seg›í Christian Matras, at Jørgen-Frantz eina tí› kendi ”lívsstarv sítt at vera í politikki, í tí at grei›a ta› fløkju, um søgan og heimfø›islig politikarar høvdu vavt vi›urskiftini Føroya og Danmarkar millum inní”. Men sjúkan gjørdi, at hann mátti geva hesa vón yvir, og hóast Jørgen-Frantz royndi at vera bla›ma›ur burturav á Politiken, so mátti hann eisini halda uppat her. Eitt verk hev›i hann kortini fingi› á skafti›, Danmark og Færøerne 1927, sum var ætla› at vísa danskarum, at vit vóru eitt fólk og tískil høvdu rætt at skipa fyri vi›urskiftum hjá okkum sjálvum. Um evnini hjá Jørgen-Frantz Jacobsen á hesum øki sigur Christian Matras: ”Vi› einum sætta sansi, sum eg veit ongan annan føroying hava átt, dugdi hann seta fram føroyskar spurningar, so danir herta›u eftir.” Kanska hevur ta› veri› honum ein stu›ul, at hann var, sum hann sjálvur rópti ta›, ”ein tjó›skaparlig hermafrodit«.

Ætlanin hjá Jørgen-Frantz Jacobsen var longu frá ungum árum at gerast politikari og søgufrø›ingur, og hann hev›i serstakar gávur á bá›um økjum, men tá i› alt hetta var fall-i› ni›urfyri, kom hann at vera ta› sum vinmenninir minst væntа›u — skald. Teir hildu hann vera alt ov vitbornan til at framlei›a skapandi list, í sta›in kundi hann gerast kritikari ella vísindama›ur. Teir mettu hann ov subjektivan á tí bókmentaliga økinum. William Heinesen sigur, at ta› er sjúkan sum ger, at Jørgen-Frantz sleppur bla›mannayrkinum. Stóran part av tí›ini var hann seingjarliggjandi, og tí gjørdist fiktiónin meiri sjálvsøgd. Kortini sigur William seg vera blivnan líka bilsnan sum Christian Matras, tá i› hann frættir, at vinma›urin ætlar sær undir eina skaldsøgu. Men bæ›i hann og Christian Matras royna at stu›la, tí teir skilja á lagnum, at Jørgen-Frantz kennir seg ótryggan í hesum samanhangi.

Bræváskifti›

William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen skriva›u sínámillum frá 1918 og líka til Jørgen-Frantz doy›i í 1938. William Heinesen nevnir í úrvalinum D‡rmæta lív (Det dyrebare liv 1958), at rúgvan av brøvum frá skyldmanninum er einar 1500 tættskriva›ar kvartsí›ur. Hetta er ta› sama sum einar fimm-seks mi›al skaldsøgur!

Evnini eru mong, men fyrstu fer› Jørgen-Frantz Jacobsen nevnir, at hann umhugsar at fara undir eitt skaldaverk er í bræví frá 10.- 11. dec. 1933. Hann hevur veri› saman vi› Otto Gelsted, og hesin hevur bi›i› hann lova sær, at fara í holt vi› skaldsøguna longu í morgin. Men Jørgen-Frantz er í iva: ”Skal eg skriva ta bókina? Ta› er ikki so lættført. Eg havi hvørki hegnislag ella skapandi hugflog til at birta í eina søgugongd. Mítt hugflog er l‡riskt, ikki episkt ella dramatiskt. Ta› er líti› fyri hjá mær at klamsa saman nakrar náttúrul‡singar. Men ta› er ikki ta›.”

Hann sigur eisini frá, at fyrsta kveikingin kom av ”vetrarhásum másum á Peblingesøen. Eg hugsa›i mær bókina at byrja ein summarmorgun kl.3-4 úti á Reyni vi› másagólan. Víst er ta› kortini ikki, minni enn so, at eg fari undir skaldsøguna nú. Kanska er meira skil í fyrst at skriva ein doktaradisputáts.”

Ta› stendur honum nevniliga í bo›i fyri gó›a løn at skriva søguna hjá monopolhandlinum í Grønlandi, men - sum William Heinesen grei›ir frá - er hetta einastu fer›, at Jørgen-Frantz nevnir sína uppgávu. Tankarnir hjá honum vóru heilt a›rasta›ni. Nevniliga hjá henni sum gjørdist fyrimyndin til Barbaru í skaldsøguni.

Estrid

Á sumri 1921 vitja›u systrarnar Marie og Estrid saman vi› mammuni Thoru Føroyar. Thora var abbadóttir gamla Restorff og fyri ein part uppvaksin í Havnini. Mamma William Heinesen var eisini av Restorff-ættini, og sostatt vóru William og gestirnir slekt. Ta tí›ina William Heinesen hev›i gingi› á handilsskúla í Keypmannahavn, hev›i hann eisini fleiri fer›ir hitt mó›ur og døtur. Og nú gleddu bæ›i William og Jørgen-Frantz seg ómetaliga at taka sær av teimum næstan javnaldrandi systrunum - Marie var fødd í 1902 og Estrid í 1904. Tær vóru nevniliga vakrar - serliga Marie - og sjarmerandi - serliga Estrid - og hartil rættar ver›insdamur, sum høvdu sæ› fittan part av heiminum. William Heinesen fortelur í bræví frá apríl 1977 til Estrid Bannister Good - solei›is æt hon seinni - at hann sjálvur sveima›i eitt sindur fyri systrunum bá›um, men at ta› ikki bleiv til meiri enn ta› sama. Hvat vi›víkti Jørgen-Frantz var søgan ein onnur: ”...ja, at hann hitti teg gjørdist hartil fatalt, og hansara veikleiki fyri tær ein stak t‡dningarmikil partur av hansara lívs innihaldi - sum skjótt øll ver›in veit.”

Fyri fyrst var kortini einki at gera, tí Estrid var trúlova› einum enskum handilsmanni, som hon stutt eftir giftist, og hjúnini búsettust í fjareystri. Men í 1928 er hon fráskild og aftur í Danmark. Jørgen-Frantz roynir at liggja framvi›, men hennara hugur stendur til sterkar og múgvandi menn, hóast hon fegin vil vera vinur Jørgen-Frantz. Í 1934 hevur hann fingi› eina íbú› í Klampenborg, og hon hjálpir honum at innrætta hana. Dreymurin hjá honum er, at tey saman skulu búgva í íbú›ini, men aftur kemur sjúkan tvørt fyri. Jørgen-Frantz ver›ur innlagdur á Vejlefjord Sanatorium, og Estrid vitjar hann í 12 dagar og roynir at stu›la, har hon kann. Hann skal vera liggjandi eina drúgva tí› og tískil tekur Estrid yvir íbú›ina í Klampenborg.

Men me›an Jørgen-Frantz Jacobsen fær vi›ger› á Vejlefjord, finnur Estrid sær sjálvari lík en n‡ggjan mann. Í sambandi vi› eina kanning ger Jørgen-Frantz eina stutta fer› til Keypmannahavn, og hann støkkur eisini inn á gólvi› hjá Estrid, at vita hvussu stendur til. Har stendur væl til. N‡ggi ma›urin er fluttur inn í íbú›ina í Klampenborg, og Jørgen-Frantz skundar sær aftur til Vejlefjord. Sambært William Heinesen angrar Estrid og fer aftan á Jørgen-Frantz til Vejlefjord, har hon í tríggjar dagar roynir at ugga hann.

Í brævi til vinmannin frá heystinum 1934 sigur Jørgen-Frantz Jacobsen seg vera grei›an yvir, at einki er at gera: ”31. aug. kom Barbara [solei›is ver›ur Estrid nevnd í brøvunum hjá vinmonnunum] yvir higar at grei›a frá stø›uni, og í gjár fór hon avsta› aftur. Ta› vikast ikki, at nú eigur annar ma›ur hana, eg hev›i frammanundan tiki› av sum bey›st, eg havi jú ongan rætt at krevja hjá henni.” Sama brævi› endar: ”Ætlanin eg á›ur havi havt um at skriva eina skaldsøgu um Beintu í søgnini fekk aftan á ta› sum her fór fram eina skúgvan framá”.

Skaldsøgan

Jørgen-Frantz Jacobsen gjørdi fleiri fer›ir vart vi›, at ta› var honum blanka ómøguligt at skriva um persónar og hendingar uttan at brúka fyrimyndir. Kjarnin í skaldsøguni er hansara egna samband vi› Estrid — ”Ein gó› transaktión hevur hon veri›, sum hevur givi› nógvan poetiskan umsetning” — men ikki fyrr enn vi› karminum frá søgnini um Beintu og Peder Arrheboe fær hann hald á bygna›inum. Um lutfalli millum skaldsøgu og søgn sigur William Heinesen: ”Annars er ón‡tt at seta bá›ar Barbarurnar, veruleikans frá tjúgu og tríati árunum og hana í søguni, hvørja upp móti a›rari - ta› ber ikki til at skilja tær sundur, kvinnumyndin í søguni er í hvørjum bragdi tikin úr veruleikanum.”

Skaldsøgan Barbara er um ta tvífaldu prestaeinkjuna Barbaru, sum giftist einum tri›ja presti, Poul Aggersøe, i› av pietistunum er sendur til Føroya at veita prestastættini ábøtur. Men eftir eina tí› sleppir Barbara prestinum upp á fjall og fer í sta›in at halda saman vi› einum ungum búskaparfrø›ingi, sum í sínum lagi svíkur Barbaru. Barbara er tann frælsi Eros, har eingin tvídráttur er ímillum ta› andliga og likami›, men bara at liva tann erotiska partin er ikki nóg miki› sum frá lí›ur, og vandin fyri tómgongd er stórur. Ikki fyrr enn hon hittir búskaparfrø›ingin, sum eisini hevur beinlei›is samband vi› ta› erotiska, uttan at hetta kortini er alt hansara, vil Barbara meiri, men nú stendur hon andlit til andlit vi› ta› loftfima lyndi›. Hon sleppur loksins at royna sítt egna medisin.

Skaldsøgan er á tremur av erotikki, men Barbara er, hóast kropslig, meira symbol enn menniskja. Hon umbo›ar ta› broytiliga lív, har gávumildni skiftir vi› vónbrot, har hop skiftir vi› mishop, har partur av lyndisey›kenninum er, at tú einki kanst rokna út.

Millum upplˆsingartí› og pietismu

Skaldsøgan Barbara er feld rættiliga neyvt inn í søgnina um Beintu og Peder Arrheboe, men vi› tí avgerandi frávikinum, at søgnin fer fram fyrst í 1700-talinum, me›an leikpallur í skaldsøguni er settur umlei› 1760. Vit skulu minnast til, at høvundurin var søguma›ur og tí stak nærlagdur øllum tílíkum vi›víkjandi. Hví flytur hann so søgugongdina eini 50 ár?

Grundin er ivaleyst hon, at hann vil væl og vir›iliga inn í Upplˆsingartí›ina, i› fevnir frá umlei› 1700 til fronsku kollveltingina í 1789. Hann vil inn til Rousseau og kanska fyrst og fremst Voltaire. Ludvig Holberg er eisini ein partur av myndini, somulei›is pietisman, sum í fyrsta lagi ger seg galdandi í Danmark í 1730'unum. Tann fyrri parturin av øldini kann sostatt ikki brúkast, men ta› kann umlei› 1760, har høvi ver›ur at seta ta t‡sk-donsku pietismuna upp ímóti tí fronsku upplˆsingartí›ini og bæ›i hesi upp ímóti tí ”føroyska” Kingo.

Upplˆsingartí›in, tí›in har skil og vit rá›a, har tú ikki bláoygdur gloypir líkum og ólíkum, og har tú krevur frælsi at trúga, tosa og hugsa sum tær hóvar, var ein fyrimyndin hjá Jørgen-Frantz Jacobsen: ”Allan musikk úr hini frálíku 18. øld, sum í senn dyrka›i vit, dugnaskap og vakurleika, og sum aldi av sær nakrar av bestu filosofunum, yrkjaran Goethe og teir ítastu komponistarnar, kenni eg meg í samljó› vi›.”

Men William Heinesen vísir eisini á, at vinma›urin hev›i eina romantiska lind og endurgevur hetta brot úr brævi frá mars 1926, sum sigur frá einum fundi á Davidsens vínstovu, har Otto Gelsted ”gav eina lyndismetan av mær, sum gjørdi meg ovfarnan: hann seg›i seg hava rakt vi›, at eg hóast mínar humanistisku rationalistisku og turrvitugu hugsjónir í míni innastu sál var ein stórromantikari, og styrki mín júst komst av hesi, sum hann seg›i so frálíka væl javnviga›u dualismu. Ta› sum um ráddi var at eingin av hesum evnapørtum, fyrst og fremst tann romantiski, ikki tók at vikna. Aftan á hetta havi eg veri› stórbilsin av Gelsteds gløgga viti.”

Men hví árini ímillum 1756 og 1763? Hví ikki 1750? Ella 1770? Svari› er mestur: Candide. Tann stutta skaldsøgan hjá Voltaire kom út í 1759, og endasetningurin: ”Il faut cultiver notre jardin” - á føroyskum: »Men nú er at fara til verka í urtagar›inum« - er meinlíkur hugblei›ingunum hjá tí gløgga sorinskrivaranum: ”at eitt líti› verk avrika› á jør›ini er betri enn tíggju fagna›arróp á himni”. Vanvir›ingin hjá Candide av tí metafysiska og vir›ingin fyri tí jar›bundna er fullkomiliga í trá› vi› fatanina hjá Jørgen-Frantz Jacobsen.

Vi›vent í holuni?

Ta› er sostatt hampiliga greitt, hví søgugongdin er flutt 50 ár í mun til søgnina, men haraftrat ver›ur mótsetningurin millum skil og kenslur spegla›ur í hvussu leikur fer. Og ikki altí› skilinum til hei›urs.

Sæ› í mun til ta skilbundnu tilverufatanina hjá Jørgen-Frantz Jacobsen - krav um galliskan greidleika o.s.fr. - vildu vit hildi›, at búskaparfrø›ingurin er hansara ma›ur. Men sum ta› púra greitt sæst av teimum tilbur›um, har hann er uppií, so er hann latur og roynir at smoyggja sær undan har til ber. Hann er solei›is ikki nóg dámligur at spæla leiklutin sum tann úrvaldi. Afturfyri er ta› eingin ivi um, at Barbara - hon, sum umbo›ar kenslurnar i› ver›a feldar av køldum viti - er l‡st, so at lesarin fær tokka til hana. At síggja til er vi›vent í holuni: høvundurin fær lesaran at halda vi› kenslunum ímóti viti og skili. Og or›ini hjá Gelsted renna okkum í hug.

Hvat prestinum vi›víkur so er hann og hansara pietisma - hóast blanka útvortis - fulkomiliga burturvi› í hesum høpi. Harra Pál er ein bloyta, pietisman ó-brúkilig, me›an kirkjan og Kingo harafturímóti eru ein ómissandi partur av føroyskari mentan. Í einum av sínum seinastu brøvum til William Heinesen skrivar Jørgen-Frantz: ”Vi› hesum vóni eg í stóran mun at hava fingi› skil á harra Pál sum ein í veruleikanum sansalig, ærusjúk, men fáfongd barokkmenniskja”. Harra Pál, umbo›i› hjá pietismuni í Føroyum, er ikki sjálvur pietistur.

Lesarin fær so lí›andi varhugan av, at skaldsøgan ikki er vor›in akkurát solei›is, sum av fyrstan tí› ætla›. Teir sum umbo›a skynsemi eru, tá i› søgan er av, ikki líka l‡taleysir sum frammanundan. Teir hava la›a› sær ein kyniskan verjugar›, so at teir ikki ver›a fløktir upp í ta› veruliga lívi›. Johan Hendrik Heyde gjøgnumsko›ar í stóran mun samanhangin, men hann vil heldur - kortini ikki órørdur - krógva seg handan bøkur og speisemi. Rationalisma uttan kenslur er minst líka ótespiligt sum ta› at lata kenslurnar valda í øllum. Eingin av høvu›sleikarunum í skaldsøguni tykist at finna hesa javnvágina.

Hugbur›urin mótvegis tilverufatanini hjá persónunum í Barbaru, avdúkingin av teirra sjálvsfatan, hevur t‡›uligan íblástur frá La Rochefoucauld (1613-80), i› var ein fyritreytin fyri upplˆsingartí›ini. Hann var háa›aligur og tískil krígsma›ur, men gjørdist sum frá lei› í sta›in tann skeptiski eyglei›arin av lívi og levna›, og hansara »Maximes« snúgva seg í høvu›sheitum um avmarkingarnar hjá mannabørnunum. Tá i› vit halda naka› ella gera so ella so, er ta› altí› vi› stø›i í sjálvsøkni. Handan allar rósverdar eginleikar húsast altí› sjálvgó›skan.

Ideologisk rák

Barbara er ein brennidepil av ideologiskum rákum. Í skaldsøguni hittast barokkur, pietisma og upplˆsing. Haraftrat føroyskt og danskt. Skaldsøgan er skriva› frá 1934 til 1938, sum jú eisini er eitt skei›, har ideologiir bresta saman. Nazistarnir eru stemma›ir til valdi› í T‡sklandi, Sovjet og Komintern gera teirra, og tankar um føroyskt sjálvst‡ri prutla undir lokinum, m.a. hjá Jørgen-Frantzi sjálvum. Og í mentanarradikalum umhvørvum ger Freud-hugsan vart vi› seg.

Tey brøv - ella partar av brøvum - sum eru prenta› í D‡rmæta lív nerta ikki ofta vi› politisk vi›urskiftir í Europa, tó at vit vita, at politikkur hev›i Jørgen-Frantz' stóra áhuga. Endamáli› vi› »D‡rmæta lív« er eitt anna›: ta› er at l‡sa menniskja› Jørgen-Frantz Jacobsen og at varpa ljós yvir skapanarsøguna hjá Barbaru. Men í einum brævi skriva› á Hotel Kongen af Danmark 20. mars 1936 sigur hann frá, hvussu gla›ur hann er fyri hvønn einasta dag, honum unnist og leggur so aftrat:

”So er ta› undarligt at hugsa sær, at Europa í hesum døgum kanska er ikki meira enn eina hársbreidd frá kríggi og tí fullgjørda ørskapi og sjálvmor›i, sum kanska eisini fer at gera ta ljómandi fjølstreingja›u heildina Keypmannahavn til ein ófatiligan hurlivasa og eitt helviti”.

Sjálvt um Jørgen-Frantz Jacobsen vegna heilsubrek og drúgvar sjúkralegur var› skúgva›ur eitt sindur til viks í tí samfelagsliga or›askiftinum, so var hann ein gløggur eyglei›ari og hartil stri›shuga›ur. William Heinesen fortelur, at hann ofta hevur hoyrt fólk umrø›a hann sum ”ein vanskiligur harri”. Ta› er tí lítil ivi um, at tey politisku og samfelagsligu vi›urskiftini í samtí›ini speglast í skaldsøguni.

Bara skræ›an er donsk

Barbara er skriva› í einum stak livandi máli, sum serliga á teimum fyrstu sí›unum er lita› av føroyskum. Hetta er ivaleyst eitt ekkó av tí upprunaligu ætlanini at lata skaldsøguna vera merkta av gøtudonskum, eini ætlan, sum vinmenn fingu høvundin frá. Í brævi frá august 1937 til Christian Matras sigur Jørgen-Frantz Jacobsen, at or›askiftini eru hugsa›i á føroyskum, at ta› bara er skræ›an, sum er donsk. Og hann leggur aftrat, at hann hevur funni› sær ”eina organiska uppgávu í at fortelja útlendingum um Føroyar, og eg vóni, at eg á tann hátt tæni mínum landi eftir føriminu.”

Hóast sjúkan var Jørgen-Frantzi ein egyptalands plága, og útlitini vóru alt anna› enn gó›, so var ta› ikki honum líkt at gremja seg. Hann vildi vera vi›, at ta› var ættarbreg›i ikki at duga at øsa seg upp av stórum vanlukkum. Hann leg›i somulei›is dent á, at ta› nettupp var spenni millum gó›ar og ringar upplivingar, i› gjørdi lívi› stórt: ”Mínar størstu stundir hava veri›, tá i› neistarnir sprungu millum sorg og gle›i. Og dey›in er í royndum bakgrundin fyri lívsins geniala relieffi.”

Tá i› Christian Matras helt sína minningarrø›u, var Barbara ikki komin út, og hóast Christian ávegis hev›i lisi› tann nógva partin, so vóru ta› kortini kapittul hann ikki hev›i sæ›. Vi› tí í huga eru tey hátí›arligu or›ini um ”ta› ikki rættiliga lidna verk” nærum profetisk: ”Henda bók og brøv hans til vinir frá sí›stu tí›ini eru so grípandi skjøl, at Føroyar og Føroyingar altí› fara at takka lagnuni fyri, at hon gav okkum so nógv í lívi hans og virki.”

Jørgen-Frantz Jacobsen avmynda›ur í 1915

100 ár